# Løgfrøðingur til Løgtingsins umboðsmann

**Eitt starv sum løgfrøðingur hjá Løgtingsins umboðsmanni er leyst at søkja frá 1. september 2009.**

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit við almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, tveir løgfrøðiligir ráðgevar og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:

- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi II, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. juli, kl. 12. Adressan er:

**Løgtingsins umboðsmaður**
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann á tlf. 358500/218691.

# KOYRIKORT? EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið og RF-Skeið byrjar mikudagin 10. juni 2009 kl. 18:00.**

Seinasti møguleiki at fáa koyrikort áðrenn summarfrítíðina




**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Andrea Isaksen | 211687 |

**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**



# Porkeris skúli

**Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2009/2010.**

Starvið er uml. 20 tímar vegna lærara í farloyvi. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Umsøkjarin skal m. a. kunna átaka sær undirvísing í:**
- Handaligu lærugreinunum
- Føroyskum
- Enskum
- Rokning

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vera við til at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum Mannbjørn Olsen, Hólavegur 15, Porkeri, í hendi í seinasta lagi tórsdagin 25. juni 2009 kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Mannbjørn Olsen, tlf. 37 32 53 ella 26 28 64.

## Her fæst Sosialurin

Sosialurin – altíð við tí nýggjasta

**Vilt tú hava feskastu tíðindini?**
– so er besta loysnin at keypa Sosialin

Verð við! Les Sosialin!

Sosialurin fæst í leysasølu kring alt landið. Bara í Suðuroynni eru 11 handlar, har tú kanst keypa Sosialin.



**Sølustøð í Suðuroy...**
- J.D.Hammer Tvøroyri
- Tangabúðin Tvøroyri
- Bakarí Gaard Tvøroyri
- Statoilstøðin Tvøroyri
- FK Trongisvágur
- Bakkhús Hvalba
- Statoil støðin Vágur
- D.J.Vilhelm Vágur
- Shell Støðin Vágur
- Í Toftum Vágur
- Signar Olsen Porkeri

Sosialurin · Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

# Broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands Kommunu

Sambært § 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at Kommunustýrið á Sandi, á fundi 25/05-2009 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands Kommunu.

Ætlaða broytingin er, at matr.nr. 15c á Sandi verður broytt frá H, landbúnaðarendamál til øki B, sethúsaendamál.

Broytingin snýr seg um at samlaði luturin á 1249 m² verður lagdur út til sethúsaendamál.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi á Kommunuskrivstovuni frá 12/6-2009 og til 12/7-2009 í vanligari avgreiðslutíð.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata Sands Kommunu skrivliga í seinasta lagi 12/09-2009.

SANDS KOMMUNA
trygd og trivnaður fyri øll

Mørkin Mikla 3 | | FO-210 Sandur | Tlf. 361034 | www.sandur.fo

# Hesteinteresseret gårdmedhjælp søges

Har du lyst til blandt andet at arbejde med islandske heste – så mangler vi en til at bo og arbejde her på vores gård i Nordsjælland. Du kan starte med det samme.

Vi har en islandshestepension som kan rumme op til 50 islandske heste

Vi har en dejlig 2-værelses lejlighed som skal deles med en anden færøsk (kvindelig) gårdmedhjælper. Du skal være over 18 år og helst have kørekort.

Du skal bl.a.: fodre, muge, slå græs, rive ridebane, lave hegn, feje, gøre rent i stald og staldrum osv. osv. Det vil sige der er en del forefaldende arbejde. Vi har maskiner til det tunge arbejde. Et par dage om ugen er der husligt arbejde at hjælpe med og lidt børnepasning kan der også blive tale om.

Vi ønsker du er en rolig natur og er den stabile og ærlige type.

Vi er rimelig fleksible og tilbyder gode bo- løn- og arbejdsforhold – så er du interesseret så kontakt Charlotte på mail: cmm@birkelyishest.dk telefon 21 44 15 18 eller 28 10 10 28